# Ógvusligt herverk á bussar

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Hitin millum 4 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og okkurt ælið mánadagin, annars turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

**Ógvusligt herverk er framt móti trimum bussum hjá Sámal Bláhamar, ið stóðu inni á hansara egna øki við Fútalág. Á einum bussi eru allir rútarnir knústir.**

HERVERK
*Magnus Gunnarsson*

Eftir at Sámal Bláhamar, ið hevur havt býbussar koyrandi síðan 1983, ikki bjóðaði upp á koyringina fyri Tórshavnar Kommunu aftur, hava bussarnir hjá honum staðið stillir síðan 1. februar. Hetta hevði við sær, at hann tók nummarpláturnar av báðum býbussunum. Talan er um bussar, ið nýliga eru høvuðsumvældir og lakkeraðir í Danmark. Eftir ætlan skuldu teir skrásetast aftur, tá summarkoyringin við ferðafólki byrjar aftur um stutta tíð. Týskvøldið varnaðust fólk at rútarnir á báðum býbussunum, sum stóðu á økinum niðan fyri Super Dekk, vóru knústir. Á tí eina bussinum var eingin rútur heilur. Eisini á fyrrverandi Spies bussinum, Toru, eru rútar knústir. Sámal Bláhamar sigur seg vera sera harman um tað sum er hent, og vónar hann, at politiið finnur út av hvør í hevur framt hesa illgerð. Tað er sera kostnaðarmikið at gera bussarnar aftur í sama stand sum teir vóru. Um nakar veit meira um hesa hending at siga, verða tey vinarliga biðin um at siga Politistøðini frá.




*Á hesum bussinum eru allir rútarnir knústir. Bussarnir eru nýliga høvuðsumvældir og lakkeraðir í Danmark*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷6 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 1 |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 17 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1043 hPa. yvir Bretsku Oyggjunum fer spakuliga eystureftir og mennist. Ein kuldabrúgv frá Lofoten til Íslands fer í útnyrðing.




Hátrýstið yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað og brúgvalagið í útnyrðing úr Føroyum viknar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/03 kl. 06[00]– 13/03 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,9°
Minsti hiti máldur í mars.: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 12/03 kl. 06[00]–13/03 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 73,5 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

7. mars: Mánin longst frá jørðini
11. mars: Fyrra kvarter
18. mars: Fullmáni
19. mars: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. mar | 03.15 | 15.40 | 02.15 | 14.40 | 02.30 | 14.55 | 05.15 | 17.40 | 06.15 | 18.40 | 01.30 | 13.55 | 00.30 | 12.55 | 03.30 | 15.55 | 04.30 | 16.55 | 03.00 | 15.25 | 04.15 | 16.40 |
| 15. mar | 04.05 | 16.29 | 03.05 | 15.29 | 03.20 | 15.44 | 06.05 | 18.29 | 07.05 | 19.29 | 02.20 | 14.44 | 01.20 | 13.44 | 04.20 | 16.44 | 05.20 | 17.44 | 03.50 | 16.14 | 05.05 | 17.29 |
| 16. mar | 04.54 | 17.18 | 03.54 | 16.18 | 04.09 | 16.33 | 06.54 | 19.18 | 07.54 | 20.18 | 03.09 | 15.33 | 02.09 | 14.33 | 05.09 | 17.33 | 06.09 | 18.33 | 04.39 | 17.03 | 05.54 | 18.18 |
| 17. mar | 05.42 | 18.04 | 04.42 | 17.04 | 04.57 | 17.19 | 07.42 | 20.04 | 08.42 | 21.04 | 03.57 | 16.19 | 02.57 | 15.19 | 05.57 | 18.19 | 06.57 | 19.19 | 05.27 | 17.49 | 06.42 | 19.04 |

5 707265 100050